## Watson ikki til Íslands

Paul Watson og Sea Shepherd hava slept ætlanini um at fara til Íslands í summar. Hetta sigur Útvarpið í morgun. Orsøkin sigst vera, at Sea Shepherd hevur sent skipið Farley Mowat, sum annars skuldi til Íslands, til Galapagosoyggjarnar í staðin fyri. Í Íslandi skuldi Paul Watson og Sea Shephard annars steðga hvalaveiðu, men nú fara teir heldur at gera eitt átak við Galapagosoyggjarnar. Har hava tey frætt um eina ætlan um at søkkja hundrað tons av jarndusti einar 250 fjórðingar vestan fyri oyggjarnar. Og tá skipið Farley Mowat var á leiðini frammanundan, gjørdu teir bara av at vera verandi.



## Trygdarmiðstøð fyri 40 mió.

Sambært Norðlýsinum fer Bjørn Kalso, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, í tingsetanini eftir ólavsøku at leggja uppskot fram um verkslagslóg um bygging av Trygdarmiðstøð við Borðoyarvík í Klaksvík. Bjørn Kalsø sigur við Norðlýsið, at talan er um ein 1700 fermetrar stóran bygning við undirvísingarhølum, venjingarhyli, umsitingarhølum og kantinu. Klaksvíkar Kommuna er til reiðar at lata øki til byggingina, og eftir ætlanini skal nýggja trygdarmiðstøðin byggjast á økinum beint uttanfyri bátahylin við Borðoyarvík. Økið er so gott sum liðugt planerað.

# Absolutt ikki drukkið og horast á sama hátt

**Mogens Tilsted Christensen var ikki á G! Festivalinum men sigur, at tað fyriganga ting á Roskilde festivalinum, sum ikki fyriganga á G!. Hvat hann meinar við, ynskir hann ikki at siga meiri um**

G! FESTIVALURIN
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*



*Myndin er frá sunnudegnum á ársins G! Festivali, har onkur er í ferð við at pakka niður, meðan onkur annar gongur nakin runt og melur*

*Mynd: Rólant Waag Dam*

Tað hevur vakt ans, at presturin í Norðstreymoyar prestagjaldi, Mogens Tilsted Christensen, í prædiku sínari sunnudagin hálovaði G! Festivalinum. Guðstænastan varð útvarpað og nøkur av somu sjónarmiðum stóðu sum lesarabræv í bløðunum í gjár.

Tað stutta av tí langa er, at tað, sambært Mogens Tilsted Christensen, ikki verður horast og drukkið á sama máta á G! sum á Roskilde. Hetta sigur hann, hóast hann ikki sjálvur hevur verið á G! Festivalinum.

Í dag hava vit fingið prestin í Norðstreymoyar prestagjaldi at grundgeva fyri tí, sum hann førdi fram á prædikustólinum sunnudagin og í lesarabrævinum í gjár.

– Tað er ein heilt annar stílur, og tað eru tónlistafólkini man kemur at lurta eftir á G!. Mentaliteturin er eisini heilt øðrvísi, har tað á Roskilde alt gongur upp í drukk og ólevna, sum man als ikki sær á G! Festivalinum, slær Mogens Tilsted Christensen fast. Hann sigur avgjørdur, at tað absolutt ikki verður drukkið og horast á sama hátt á G! sum á Roskilde Festivalinum.

Mogens Tilsted Christensen sigur seg vera imponeraðan av, at tað hvørt ár hepnast at halda festivalin uttan teir stóru trupulleikarnar sum annars eru á øðrum stórum festivalum – ella í hvussu so er á Roskilde Festivalinum, sum prestur tekur til.

### Slepst ikki undan naknum fólkum

Eftir hvønn einasta Roskilde Festival vísir sjónvarpi og bløðini í Danmark myndir frá døgunum, festivalurin hevur verið. Fleiri myndir av naknum fullum fólki eru at síggja, men í so máta er G! Festivalurin einki undantak. Tí bæði í ár og í fjør runnu naknir menn runt á tjaldplássinum, umframt at onkur nakin kvinna eisini er sædd viðhvørt.

Hetta vitna myndir og videobrot á alnetinum um. Til hetta svarar prestur, at tað á slíkum festivalum sum G! ikki slepst undan, at tílíkt kemur fyri.

– Tað er eitt frítt land vit liva í. Tað fara altíð at vera nøkur fá, sum gera ting, ið vit ikki brýggja okkum um, sigur Mogens Tilsted Christensen.

### Vil ikki tosa um alt

Í fjør gjørdu fjølmiðlarnir rættiliga nógv burturúr tjaldplássinum, har tað eftir øllum at døma vóru rúsevnir at finna. Hetta gera vil prestin í Norðstreymoy varugan við, og hann svarar soleiðis:

– Jú, men á Roskilde fyriganga onnur ting, sum ikki fyriganga á G! Festivalinum.

Hvat eru tað fyri ting?

– Tað er tað, sum eg helst ikki vil tosa um, tí veitst tú hvat, tað kanst tú lesa um í bløðunum. Men Roskilde festivalurin er á onkran hátt meiri ein pornofestivalur enn konsert, staðfestir Mogens Tilsted Christensen, leggur so aftrat:

– Sjálvandi verður ein verðsligur festivalur merktur av, at nøkur fáa eitt sindur at drekka og eitt sindur av ólevnaði er. Tað slepst ikki undan.

### Var ikki á G!

Mogens Tilsted sigur víðari, at tað ikki er sami mentalitetur á G! sum aðrastaðni, og so hevur hann eisini gjørt nakrar sjáldsan eygleiðingar av før ingum.

– Føroyingar nógv be til hetta, og føroying duga eisini nógv betur hoyra, hvat góður tór leikur er, sigur Mogen Tilsted Christensen sum heldur at Føroya eru eitt tónleikasamfelag og ikki bara eitt fiskivinnusamfelag.

Men hevur tú sjálvur verið á G! í ár?

– Nei, men eg kenni fólk sum hava verið. Eg havi ikki havt tíð sjálvur, men eg havi so lisið bløðini og heimasíður, vísir Mogens Tilsted Christensen á, sum eisini hevur heft seg við tað, løgreglan segði um og eftir festivalin í Gøtu um vikuskiftið.



G-festival og alkoholens forbandelser

MOGENS TILSTED CHRISTENSEN
Sognepræst på Nordøerne

I en tid, hvor der afholdes mange sommerfestivals i Europa, er der tid til at se på, hvad konsekvenserne kan være, når disse såkaldte festivals løber af stabelen. Roskilde-festivalen i Danmark, der i år blev afholdt i ugerne i begyndelsen af juli måned, rangerer som den ypperste rockfestival i Europa, forstå det, hvem der kan.

Rockfestivalen er ikke noget godt eksempel på for Færøernes ungdom, der netop lige har afholdt sit eget store og vellykkede G-festival. Tillykke med dette arrangement, der på ingen måde ligner Roskilde druk- og hor-festival.

faktisk på en anden plads. Den burde være en førsteplads som nr. 1. Den alkoholfrie festival var et præ-eksempel for den verdslige ungdom, og dem skal der nu engang også være noget for og være plads til. Politiet beretter om minimale problemer og fredfyldt forløb.

Men ungdom, festival og alkohol er en farlig blanding, og den må man behandle med ansvarlighed.

Dvs. at man som voksne og forældre må undervise sine børn i alkoholens og stoffernes skadelige virkninger.

Allerede for to tusinde år siden vidste man, at alkohol medfører forbandelser og har dårlige bivirkninger. Paulus skriver i brevet til menigheden i Efesus kap. 5, vers 18: "Drik jer ikke beruset i vin, det fører til udskejelser, men lad jer

Slagsmål på værtshuse, i hjemmene og andre steder, familieødelæggelser, pædofili og lignende ulovligheder, overgreb af forskellige slags, trafik-forseelser med voldsomme skader, fyringer på arbejdspladsen, svigt af ansvar o.s.v.

Der er ingen grund til at tage alkohol i forsvar.

Men når det så er sagt, så er tiden måske ved at være inde, hvor man på Færøerne i år 2007 bør se på, om et overformynderi i form af rusdrik-butikker har nogen som helst berettigelse i et oplyst, veluddannet og moderne Færøerne på vej mod 2015?

Alle, som vil have alkohol, kan købe det i lufthavne, i flyet, på færgerne, i Danmark og mange andre steder til den halve af den overpris, der skal betales i monopol-

*Lesarabrævið hjá Mogen Tilsted Christensen*